

# Nýtt posthús á Sandi

**Nýtt posthús er latið upp á Sandi. Posthúsið, ið heldur til í leigaðum hølum í bygninginum hjá Føroya Banka, liggur væl fyri miðskeiðis í bygdini**

POSTHÚS
*Magnus Gunnarsson*

**Sandur:** Mánadagin 27. januar lat posthúsið á Sandi upp í nýggjum hølum, ið eru leigaði frá Føroya Banka. Upprunaliga átti gamli Sjóvinnubankin bygningin. Síðan bankarnir løgdu saman, hevur Føroya Banki átt hendan bygningin. Føroya Banki hevur bygt upp í verandi bygning, og halda teir sjálvir til har. Postverkið hevur síðan leigað og innrættað gamla bygningin. Stovnarnir báðir hava felags inngongd, og í gongini hava teir eina korttelefon, sum kann verða hent hjá ferðafólki, sum ferðast í Sandoynni. Posthúsið á Sandi hevur í nøkur ár hildi til í húsunum hjá Heidi og Rúna Winther. Annars hevur posthúsið fyrr verið miðskeiðis í bygdini. Ein fyrimunur við nýggja posthúsinum er, at parkeringsviðurskiftini eru sera góð. Posthúsleiðari á Sandi er Sólbjørg Skoubo. Tey avgreiða eisini postin til eysturbygdirnar í Sandoynni.














# Prix Føroyar kravt eyka fólk

**Politiið í Eysturoynni hevur tey vikuskiftini, Prix Føroyar hevur verið á skránni, havt eyka manning á vakt. Hetta hevur eisini hjálpt, tí nógv hevur ikki verið at gjørt, tá undanumførini hava verið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði**

POLITI
*Ingrid Bjarnastein*



*Sjálvt um Prix Føroyar umførini nú hava blómað seks vikuskifti í Fuglafirði, so hevur ikki verið so nógv hjá politinum at gera. Politiið í Eysturoynni sigur, at fólk hava sum heild skikkað sær væl*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Um vikuskiftið var seinasta innleiðandi umfarið av Prix Føroyum í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Og eins og til hini undanumførini hevði politiið í Eysturoynni brynjað seg til tiltakið og sett eina eyka manning á vakt hetta kvøldið.

– Vit hava havt tvey harðskapsmál hetta vikuskiftið. Her var talan um ein, sum hevði fingið skaða í høvdið og varð innlagdur til observatión, sigur vakthavandi á politistøðini í Runavík.

Annars var tað onkur, sum hevði til fragd at stjala bilstereo úr bilum um vikuskiftið við Mentanarhúsið. Tveir bilar mistu sítt stereo, tí bilarnir stóðu ólæstir.

## Á góðari leið

Politiið í Runavík sigur tó, at vikuskiftini hava øll verið á góðari leið, og fólk hava sum heild skikkað sær væl.

– Tá hugsað verður um umstøðurnar, at tað eru nógv ávirkað fólk savnað, so hevur tað staðið væl til. Vit hava jú eisini havt eyka fólk á vakt, og verið á staðnum, so tað hevur eisini gjørt mun, sigur vakthavandi í Runavík.

Prix Føroyar umførini hava kravt ein eyka innsats frá politinum í Eysturoynni, og hetta hava fólk eisini lagt merki til.

Lýst hevur verið í útvarpinum, at politiið hevur verið úti, og heitt hevur verið á fólk um at vera ansin.

– Hetta hevur helst eisini hjálpt, metir vakthavandi í Runavík.

Tilsamans eru seks fólk tikin fyri at koyra við kenning. Tað er í miðal eitt fyri hvørt kvøldið innleiðandi umførini hava verið. Harafturat hava átta harðskapsmál verið og bert tvey fólk eru tikin fyri at koyra ov skjótt.

– Ein kann jú eisini siga, at seks eru seks ov nógv, men ein er jú eisini ein ov nógv, men vónandi er hetta minni enn, hvat tað hevði verið um vit ikki høvdu sett orku av til hetta, sigur vakthavandi.

– Vit hava eisini varhugan av, at nógv hava privatførara tá tey skulu eitt slíkt langt strekki, og eisini eru tað nógv foreldur, sum koyra tey ungu um næturnar. Tað hava vit í øllum førum sæð tá vit hava steðgað bilum.

Ferðslan hevur verið væl kannað, fólk hevur verið á staðnum og inni í húsinum, og harafturat hava vaktafólkini Mentanarhúsið hevur havt hjálpt væl til eisini.

# Herverk í Háskúlanum

**Fríggjakvøldið var herverk úti í Háskúlanum á Hornabø. Ein pulvursløkkjari varð tømdur um stórar partar av skúlanum**

HERVERK
*Ingrid Bjarnastein*




*Í Háskúlanum í Hornabø í Havn hava fýra ungir mans um vikuskiftið tømt ein pulvursløkkjara*

Fríggjanáttina fekk politiið í Havn fráboðan um herverk á Føroya Fólkaháskúla úti í Hornabø í Havn.

Fýra ungir mans høvdu sproytað og tømt ein pulvursløkkjara út um ítróttarhøllina, seymistovuna og á hurðarnar har.

Teir skulu gjalda endurgjald fyri herverkið og sak verður skrivað um málið.

## Onnur herverk

Eisini aðrastaðni í býnum hava herverk verið. Á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin í Havn hevði onkur brotið ein rút í høvuðshurðini. Rúturin var sparkaður inn, men politiið hevur ongar upplýsingar um gerningsmannin.

Leygarnáttina var eisini ófriður á Argjavegnum. Nakrir mans vóru niðri á støðni, har teir sparkaðu og ristu í lyktapelar fyri antin at fáa teir at lýsa eitt løgið blátt ljós ella fyri at fáa skammlop í. Politiið kom á staðið og tosaði við ungu menninar.

Um eitt tíðina somu nátt varð boðað frá larmi í Vesturgøtu. Har var tað ein, sum hevði innflytingarveitslu, sum hevði hug til at hava tónleikin ov hart frá. Politiið fór á staðið og gav viðkomandi boð um at skrúva eitt sindur niður, so grannarnir kundu fáa náttarfrið.

# Havnará dálkað

DÁLKING
*Ingrid Bjarnastein*

Sunnudagin fekk politiið í Havn boð um, at Havnará var dálkað. Við brúnna við skótahúsið og hvíldarheimið var ein gráurhvítur litur at síggja í ánni, men ongin luktur kom frá ánni.

Heilsufrøðisliga Starvsstovan varð boðsend fyri at taka nakrar vatnroyndir, og hetta verður nú kannað. Hvat talan er um, veit politiið ikki enn at siga frá.

# Nógv full fólk

**Vikuskiftið í Havn hevur enn einaferð verið merkt av, at nógv full fólk hava gingið og malið í gøtunum**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Vikuskiftið er júst farið afturum bak, og í Havnini hava nógv full fólk verið og gjørt um seg í gøtunum. Fleiri hava verið og sovið rúsin av sær á politistøðini, og eisini nøkur eru koyrd heim.

Á Velbastað hevði ein taxabilur trupulleikar við einum fullum manni fríggjakvøldið, og eisini við Dalavegin var ein tikin oman á støðina at sova rúsin av sær. Við Sankta Frants skúla vóru tað nakrir fullir persónar, sum sótu á takinum og hildu gang, so politiið noyddist at fara á staðið at fáa tey burtur. Hetta var eisini fríggjakvøldið.

Hesa somunátt vórðu tveir eisini tiknir í Rasmusargøtu, har teir gingu og róptu og larmaðu. Teir verða ákærdir fyri brot á politiviðvøkuna.

Sama skil var uttanfyri Manhattan um fimm tíðina, og eisini var ein uttanfyri Evangeliihúsið um sekstíðina.

Í Grasagarði í miðbýnum var ein funnin um níggju tíðina leygarmorgunin, og hann var sendur oman á politistøðina at sova rúsin av sær.

Fleiri dømi kunnu eisini nevnast. Við Kaggan, við Ebenezer, við Hafnia, Shell á Frælsinum, við Føroya Banka í miðbýnum og so framvegis. Allastaðni eru tað ávirkað fólk, sum hava gjørt um seg. Tey eru antin koyrd heim ella á politistøðina at sova rúsin av sær.

So politiið í Havn hevur havt úr at gera við fullum fólkum, og verður sagt, at hetta er ikki nakað óvanligt.

# Stuldur í Badminton-høllini

STULDUR
*Ingrid Bjarnastein*

Tvey mál um stuldur eru um vikuskiftið meldað til politiið í Havn. Í umklæðingarrúminum uppi í Badmintonhøllini hevði onkur verið og tikið eina fartelefon og pengar úr einum hvítum posa.

Eisini hevði onkur tikið pengar úr eini mappu, sum lá inni í høllini.

Hetta hendi seinnapartin leygardagin, og sagt verður av Kriminaldeildini á politistøðini í Havn, at enn vita tey ikki, hvør gerningsmaðurin er.